Eftir fundin við Løgtingsins Fíggjarnevnd ídag tann 20. Apríl

Á fundinum ídag við Løgtingsins Fíggjarnevnd fingu vit at vita, at Fíggjarmálaráðið hevði svara okkara viðmerkingum – tað høvdu vit ikki fingið fráboðan um og fingu tí ikki sagt, um svarini vóru nøktandi.

Vit greiddu frá, at okkara viðmerkingar til lóggávu og viðmerkingar eru grundað á, at lítið varð gjørt burturúr at greiða frá hvussu trygdin er í og rundanum Mínboks. Av tí at Mínboks veðrur rættiliga sentralur miðil við hesi lóggávu, er umráðandi at tað ikki verður sett spurnartekin við trygdina. Serliga hugsa vit um, at brúkarin og sendarin skulu vera trygg við, at innihaldið í brøvum eru intakt og ikki kunnu broytast og at eingin óviðkomandi fær atgongd til brøvini.

Annars gjørdu vit eisini vart við at KT-felagið tekur undir við Mínboks sum almennur talgildi postkassin og halda, at tað vildi verið gott, um privat virkir eisini kunnu gera brúk av hesi skipan. Tað er tó ikki so lætt í dag, tí privata vinnan hevur ikki lógarheimild at brúka P-talið. Í hesum uppskoti til lóggávu verður biðið um, at P-talið kann brúkast til Mínboks, men vinnan hevur brúk fyri at P-talið verður leysgivið so vinnan kann brúka bæði Talgilda Samleikan og Mínboks uttan at skula gera eyka skráir sum bert kunnu brúkast til hetta eina endamálið.

Niðanfyri hava vit roynt at svara viðmerkingunum frá Fíggjarmálaráðnum. Svarini frá okkum standa við reyðum.

Viðmerkingar til lógartekstin

§3, stk. 2 Merkir at Mínboks kemur at innihalda flest allar fráboðanir við viðkvomum dátum frá almennu stovnum til borgaran. Hettar ber nakrar spurningar við sær sum ikki eru viðgjørdir.

1. Hvørjir váðar eru til staðar fyri at upplýsingar koma til óviðkomandi?
2. Hvørjar eru avleiðingarnar?
3. Hvørjar yvirskipaðar tøkniligar fyriskipanir eiga at vera framdar fyri Mínboks? M.a heldur KT-felagið, at brøvini eiga at verða bronglaði á goymsluni hjá Mínboks soleiðis bert borgarin kann lesa brøvini og at t.d. Mínboks umsitarar ikki kunnu lesa innihaldið í brøvunum)

Lógin áleggur løgfrøðiligum persónum at binda í Mínboks um teir hava tørv á talgildum upplýsingum frá almennum stovnum har upplýsingarnar verða mettar at vera trúnaðarupplýsingar. Men tá hentleikin ikki finnst í skipanini enn, er tað ov tíðliga at áseta hesi viðurskifti í lóg.

Svar - Fíggjarmálaráðið:

Talgildu Føroyar gera áhaldandi váðagreiningar av Mínboks, undir hesum eisini hvørjar tøkniligar fyriskipanir eiga at verða framdar.

Í nýggju heildarætlanini 3 fyri Talgildu Føroyar sigur átak nr. 8: "Borgarar, vinna og tað almenna kunnu trygt og einfalt samskifta sínámillum. Hetta krevur at at lóg um almennan postkassa verður gjørd, sum javnsetur talgilda postkassan við tann, ið hongur á húsavegginum.

Mínboks skal dagførast til at kunna handfara økta samskiftið, har vinnan fær gjørt nýtslu av Mínboks, bæði sum avsendari og móttakari.

”Eisini frágreiðingin hjáVakstrarforum um KT, harKT-felagið var væl umboðað í arbeiðsbólkinum, viðmælir í átaki 9, ein talgildan postkassa til øll, har“Borgarar og vinna hava ein talgildan postkassa á Vanganum, sum ger tað lættari og tryggari at samskifta.”4

Svar – KT-felagið 20. apríl

Tað er fint, at tað vera gjørdar váðametingar av Mínboks. Svarið frá Fíggjarmálaráðnum omanfyri sigur tó ikki um møguligir váðar vera beindir av vegnum.

Ítøkiliga hava vit mett, at tá Mínboks við hesi lóggávu verður rættiliga sentralur miðil, má álitið á Mínboks vera intakt. Tað var við tí í huga, at vit gjørdu viðmerkingar til fleiri ting undir viðmerkingunum, sum vit meta eru av týdningini fyri bæði brúkaran og sendaran. Vit seta tí hesar ítøkiligar spurningar, sum vit ikki meta eru svaraðir:

- *Hvussu verður tryggjað, at óviðkomandi ikki fáa atgongd til innihaldið í brøvum ?*
- *Hvussu verður tryggjað, at brøv ikki kunnu broytast tá tey eru komin í Mínboks ?*
- *Hvussu verður tryggjað, at tað er ófrávíkiliga væl frámerkt nær eitt bræv er komið í Mínboks ?*
- *Hvussu verður tryggjað, at eitt bræv ikki kann sendast í skeiva Mínboks ?*
  - *Hvat er mannagongdin um eitt bræv onkursvegna verður sent inn í skeiva Mínbok ?*

§5. Rættarvirknaður

Til slíkan rættarvirkna eigur skipanin at brúka eitt óavvísiligt tíðarstempul fyri móttøku av brævi. Tíðarstemplið skal vera sjónligt fyri brúkaran av Mínboks og sendari eigur eisini at fáa tíðarstempli aftur frá Mínboks tá eitt bræv er sent. Hetta tikist at virka við innritan frá teldu, men ikki við appini.

Svar - Fíggjarmálaráðið:

Hetta er partur av loysnini í dag. Talgildu Føroyar taka upp samskifti við KT-felagið um at fáa hesa viðmerking útgreinaða.

Svar – KT-felagið 20. apríl
Vit vilja gjarna taka prát við Talgildu Føroyar um hetta, so vit fáa staðfest, at her er talan um ófrávíkiligt tíðarstempul..

§6. Persónstalið

Spurningurin um at útflýggja p-tal til løgfrøðiligar persónar fyri at lætta um teirra arbeiðið við íbinding til Mínboks, eigur at viðgerðast í breiðari høpi enn bert fyri tænastuna Mínboks. T.v.s. kann p-talið latast løgfrøðiligum persónum tí tað lættir um hjá løgfrøðiliga persóninum at fremja sítt virksemi, herundir senda brøv til Mínboks, rita inn við Samleikanum og fáa p-tal upplýst og lætta um samkoyring av egnari kundaskrá við persónsskránna hjá Landsfólkayvirlitið?

P-talið er eymerkingin av einstaklinginum. KT-felagið heldur, at P-talið eigur at leysgevast. Tað er eingin orskøk at bert summir stovnar skulu hava atgongd til hetta.

Svar - Fíggjarmálaráðið:

Átak 5. í nýggju Heildarætlaninifyri Talgildu Føroyar sigur: “Privata vinnan skal, eins og almennir myndugleikar, kunna brúka P-talið sum eintýdda eyðmerking. Hetta er ein fortreyt fyri, at vinnan kann

fáa størri gagn av m.a. Samleikanum, Hetta ger talgildingina tryggari og munadyggari fyri alt samfelagið."

Svar – KT-felagið 20. apríl

Eitt átak í nýggju heildarætlanini hjá Talgildu Føroyum broytir ikki verandi støðu, at privata vinnan ikki kann brúka P-talið. Til tað krevst ein lógarbroyting fyri nýtslu av P-talinum.

Um svarið frá Fíggjarmálaráðnu merkir, at tey eru í holt við at leggja fram uppskot til broytingar, og tað er undirtøka fyri broytingini, vildi verið gott at vita nær vit kunnu vænta at P-talið verður leysgivið til nýtslu, so privata vinnan eisini kann eyðmerkja persónar við p-tali.

Viðmerkingarnar:

s4. "...loysnin lýkur krøvini um trygt talgilt samskifti..." – KT-felagið heldur, at metingin eigur at vera viðløgd her. Harumframt hevur tað minst líka stóran týdning, at Mínboks hevur trygga talgilda goymslu (bronglaða goymslu)

Svar - Fíggjarmálaráðið:

Mínboks liggur í Landsnet umhvørvinum, ið verður árliga skoða eftir 27001 standardinum. Eisini verður Mínboks skipanin sjálv skoða eftirISAE 3000 standardinum.Boðini í Mínboks ferðast umvegis Heldina, ið er tryggi samskiftispallurin, ið almennu Føroyar hava valt at nýta samsvarandi rundskrivið um Heldina.

Svar – KT-felagið 20. apríl

Um svarið frá Fíoggjarmálaráðnum merkir, at innleiðandi spurningar um "hvussu verður tryggjað...."., eru greiddir og harafturat tryggjar, at brøvini ikki kunnu lesast ella broytast á vegnum til Mínboks, so er brúkarin og sendari tryggaður

S5 "...Mínboks skal veita trygd fyri, at samskiftið ikki verður broytt á vegnum, og at samskiftið er bronglað, so at samskiftið ikki kann lesast av óviðkomandi..." – KT-felagið vil vísa á, at tað somuleiðis hevur minst líka stóran týdning, av brøv ikki kunnu broytast meðan tey eru í goymsluni hjá Mínboks og ikki kunnu lesast av óviðkomandi, meðan tey eru í goymsluni hjá Mínboks.

Svar - Fíggjarmálaráðið:

Talgildu Føroyar gera áhaldandi váðagreiningar av Mínboks, undir hesum eisini hvørjar tøkniligar fyriskipanir eiga at verða framdar.

Svar – KT-felagið 20. apríl

Um svarið frá Fíoggjarmálaráðnum merkir, at innleiðandi spurningar um "hvussu verður tryggjað...."., eru greiddir og harafturat tryggjar, at brøvini ikki kunnu lesast ella broytast á vegnum til Mínboks, so er brúkarin og sendari tryggaður

S5. "...Hetta merkir, at um ein sendari vil vera við, at viðkomandi ikki er sendari... so hevur sendarin prógvbyrðuna av, at viðkomandi ikki er sendarin." – KT-felagið heldur, at neyðugt er at grundgeva fyri hvørjar tøkniligar fyriskipanir eru framdar, so at hetta er eitt rímiligt krav

Svar - Fíggjarmálaráðið:
Tryggar mannagongdir í sambandi við at sendarar kobla seg á Mínboks og Heldina umframt loggar,ið Heldin førir við samskifti,ger,at eingin ivi er um, hvør sendarin er.

Svar – KT-felagið 20. apríl

Fínt at brúka loggar til endamálið. Umráðandi er so eisini at tryggja sær, at loggarnir eru intaktir og ikki kunnu broytast, so ivi ikki er kann setast við loggarnar

S6. "Fyrimunir við skipanini" – undarligt at grundgeva við at tað slepst undan at menna integratión til Samleikan og so ikki nevna at ístaðin skal ein integratión mennast til Mínboks. Harumframt er Samleikin ein hornasteinur í føroysku taldildingini og tað óskilligt at grundgivið fyri ikki at binda seg í Samleikan. Er áskoðanin at kostnaðir er ov høgir at binda seg í Samleikan, so er at seta gjaldið niður.

Svar - Fíggjarmálaráðið:

Avsnitti í víst verður til upplistar fyrimunir. Integratión í Mínboks verður nevnd undir fíggjarligar avleiðingar.Fíggjarmálaráðið tekur undir við at Samleikin er ein hornasteinurí føroysku talgildingini. Stovnar og virkir,ið nýta Mínboks, fáa gagn av Samleikanum á sama hátt sum onnur í hava eitt beinleiðis knýti í Samleikan–tað eru tó nakrar stórrakstrarfyrimunir við slíkari sentrali skipan,undir hesum ikki at gera egna integratión í Samleikan.

Svar – KT-felagið 20. apríl
OK

S7 "...Tað krevur ikki stórvegis KT kunnleika á stovnunum fyri at knýta seg í Mínboks..." –Her vil KT-felagið vísa á, at tað krevur forritanar kunnleika at sambinda egna skipan við Mínboks.

Svar - Fíggjarmálaráðið:

Hetta er rætt. Viðmerkingar eru tillagaðar

Svar – KT-felagið 20. apríl
OK